# Baraldarrunn

## Stutt vegleiðing um, hvussu spælt verður.

**Ein rørslusangur, ið nógv syngja tá tey dansa um jólatræið. Sangurin hóskar tó væl at syngja alt árið. Øll leiðast og ganga í ring, meðan rørslur verða gjørdar til tað, sungið verður um.**

*Vit ganga runt um ein baraldarrunn,*
*baraldarrunn, baraldarrunn.*
*Vit ganga runt um ein baraldarrunn,*
*tíðliga mánamorgun.*

*Soleiðis vaska vit klæðini rein,*
*klæðini rein, klæðini rein.*
*Soleiðis vaska vit klæðini rein,*
*tíðliga mánamorgun.*

*Vit ganga runt um ein baraldarrunn....*
*tíðliga týsmorgun.*

*Soleiðis skola vit klæðini rein.....*

*Vit ganga runt um ein baraldarrunn....*
*tíðliga mikumorgun.*

*Soleiðis hanga vit klæðini upp....*

*Vit ganga runt um ein baraldarrunn....*
*tíðliga hósmorgun.*

*Soleiðis strekkja vit klæðini út....*

*Vit ganga runt um ein baraldarunn....*
*tíðliga fríggjamorgun.*

*Soleiðis strúka vit klæðini sløtt....*

*Vit gang runt um ein baraldarrunn....*
*tíðliga leygarmorgun.*

*Soleiðis skúra vit okkara gólv....*

*Vit ganga runt um ein baraldarrunn....*
*tíðliga sunnumorgun.*

*Soleiðis fara í kirkju vit øll....*



GIGNI
Heilsufrøði til børn & ung

Niels Finsensgøta 37 · Postboks 132 · 110 Tórshavn · Tlf:562 300 · www.gigni.fo